**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Heilsurøktarar til E2/E3

Tvey avloysarara fulltíðarstørv í skiftandi vaktum sum heilsurøktarar eru leys at søkja á **E2/E3** til setan 15. august til og við 31. desember 2004 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki.

E3 er ein medisinsk deild, við 7 seingjaplássum. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við dis. sclerosu. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupædagog. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum. Vit ynskja starvsfelagar við huga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv sum heilsuatstøðingur
- fakligan áhuga innan røkt og viðgerð av apoplexi sjúklingum
- fakligan áhuga innan eldrarøktina
- fakligan áhuga innan rehabilitering
- góð samstarvsevni

**Fyrimun** hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan øki

**Vit kunnu bjóða**
- góðar og dugnaligar samstarvsfelagar.
- góða upplæring
- eitt umhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og vera við til at menna sjúkrarøktina

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja tlf 304500, Monica Brickmann deildarleiðara, lokal 6012, ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Almanna- og Heilsurøktarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 30 juli 2004 kl. 12.00.

Skivlig umsókn, merkt "umsókn til starv" við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk*

# Vegna summarfrí

Er kommunuskrivstovan stongd frá 19. juli til og við 13. august 2004.

**Sunda kommuna**

# Runavíkar kommuna

**søkir eftir pedagogum til Barnagarðin á Mýrunum**

Barnagarðurin á Mýrunum er normeraður til 94 børn. Stovurnar eru skipaðar við 2 vøggustovum við 14 børnum í hvørjari, og 3 barnagarðstovum við 18 børnum í hvørjari og einari blandaðari stovu við 12 plássum.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum, at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

**Vit ynskja tí at umsøkjarin:**
- hevur umsorgan fyri børnunum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álitandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

Søkt verður eftir 2 pedagogum á 40 t. um vikuna, lønarstig 10-16.

Setan verður frá 1. oktober 2004 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Fríðu Lómstein, leiðara á tlf. 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 2. august 2004 kl. 12:00

Runavíkar Kommuna.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

Spírin
Zoneterapi
Oyraakupunktur
Kostvegleiðing
Sanna Hentze
Fugloyarvegur 10
Tel. 316 134 / 516 114

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Ljósmóðir

Á Ljósmøðraskipanini á Landssjúkrahúsinum er eitt 3/4 tíðar avloysarastarv sum ljósmóðir leyst til setan 1. september 2004 til 31. august 2005.

**Løn- og setanarviðurskifti** smb. sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Ljósmøðrafelag Føroya.

Vit vóna, at tú hevur ein positivan hugburð til arbeiði, og ert góð/ur til at samstarva.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Ruth Vang, leiðandi ljósmóðir, telefon 304500, lokal 5301.

Umsóknarfreistin er 24. august 2004 kl. 12.00.

**Skivlig umsókn** merkt "umsókn til starv" við CV, avrit av prógvum, autorisatión, viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk*

# Rør&Blikk

## RØR- & BLIKKSMIÐUR

Søkt verður eftir royndum rørsmiði at byrja beinanvegin.

Starvið fevnir um rørsmíð, blikksmíð, vatnviðgerð til svimjihylar, og lekaleiting við sera framkomnari útgerð.

Neyðug upplæring innan lekaleiting og vatnviðgerð verður givin.

Talan er um fast arbeiði við góðari løn.

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tel 322 999 · far 225 345

*Rør & Blikk fæst umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svimjihylar og lekaleiting.*

Rør & Blikk, Undir Gráasteini 65, 100 Tórshavn,
tlf: 322 999 far 225 345
www.rorblikk.fo

**Toll- og Skattstova Føroya**

# Broyttar avgreiðslutíðir

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar,

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

*www.tollskatt.fo*
*tollskatt@tollskatt.fo*

Vegna summarfrí verða avgreiðslutíðirnar á økisskrivstovunum kring landið broyttar í nakrar vikur.
Tú fært nærri upplýsingar á Økisskrivstovuni ella á heimasíðuni www.tollskatt.fo

Í Stýrinum á Argjum verður afturlatið í viku 30, 31 og 32, tvs. frá mánadegnum 19. juli til og við fríggjadagin, 6. august.

**Argir, 13. juli 2004**
**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**



# Forritari

Søkt verður eftir einum forritara, at byrja beinanvegin.

**Arbeiði**
Vit bjóða eitt spennandi arbeiði við avbjóðingum og ábyrgd, har tú gerst ein partur av forritaradeildini.

**Um Com-Data**
Com-Data er elsta KT fyritøka í landinum og hevur í dag 25 fólk í starvi. Fyritøkan hevur deildir í Klaksvík og í Runavík. Í løtuni verður nýggjur bygningur bygdur í Klaksvík.

**Førleikakrøv**
Neyðugt er við royndum innan forriting og kundarøkt. Ástøðilig útbúgving og kunnleiki til SQL er ein fyrimunur. Vit vænta at tú ert ágrýtin, samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur og hevur lætt at koma í samband við fólk.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt sambært avtalu. Fyrstu 3 mánaðirnir verða at rokna sum royndartíð. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til William West leiðara á forritaradeildini.

**Umsóknirnar**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir, verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi fríggjadagin 23. juli 2004. Umsóknirnar kunnu meylast til **ww@com-data.fo** ella sendast til:

COM-DATA

**Com-Data P/F**
**Att.: William West**
**Postboks 19**
**Stengarvegur 53**
**700 Klaksvík**

**Mrk. Forritari**

# Skrivstovuhølir til leigu



Umleið 500 m2 verða hervið lýstir til leigu í bygninginum í Traðagøtu 43 á Argjum

Hølini, sum nýliga eru gjørd í stand, eru ætlað til skrivstovu ella líknandi endamál. Tað snýr seg um 13 skrivstovurúm umframt fundarhøli, køk og goymslu.

Best er um hølini verða leigað undir einum.

Áhugaði biðast venda sær til

**P/F FARCOD**
**Traðagøta 43**
**165 Argir**

Tel 31 93 33 · Fax 31 82 03 · e-mail: farcod@post.olivant.fo

# Handilslærlingur

**Søkt verður eftir Handilslærlingi til VHS handilin á Hálsi, at byrja tann 16. august 2004**

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv til tann sum fær læruplássið, har viðkomandi sleppur at royna seg sum vørukeypari, gera tilboð og prýða um handilin. Viðkomandi fær eina breiða vitan um ventilatión, hitaanlegg og sanitet.

**Uppgávurnar fevna m.a. um:**
- Avgreiðslu av kundum
- Telefon avgreiðslu
- Røkt av handlinum
- Bílegging av vøru
- O.a. fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv:**
At tann, sum søkir skal hava lokið FHS ella HH prógv

Send eina skrivliga umsókn til:

**P/F Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8
Postboks 182
110 Tórshavn

Meira fæst at vita við at ringja til Símin ella Áka á telefon 312000

**pf Maria Poulsen & Co.**
FO-100 Tórshavn • tel 312 000

*P/F Maria Poulsen, er størsta HVS virkið í Føroyum, við handli, verkstaði og búnýti. Í dag starvast 35 fólk hjá fyritøkuni*

Sosialurin 341800

# Summarfrí

Verkstaðið er í summarfrí
frá 19. juli til 16. august.

Bilasølan og eykalutagoymslan
er tó opin sum vanligt.

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35

# Frá Psoriasisfelagnum

Viðgerðartúrurin til Bláa Lónið í Íslandi verður 17. september til 15. oktober.

Tey, ið hava tørv á viðgerð, verða biðin um at fara til egnan kommunulækna. Lækinin fyllir umsóknarblað út og sendir tað til húðlæknan.

Umsóknin skal latast inn seinast 30. juli.

Um ivaspurningar eru hesum viðvíkjandi, eru tit vælkomin at ringja til Majgunn Poulsen, tlf. 424179.

**Føroya Psoriasis Felag**

# málingin til húsini fæst í máling & gólv

Samstundis sum vit selja við stórum avsláttri av okkara málingagoymslu verður latið 10% í avsláttri av máling ið ikki er á útsølu - tilboðið er fyri innflutta máling

Til dømis:
STORMSHIELD
BETONMÁLING 10L fyrr 549,-
**-10%: nú 494,-**

TRÆVERJA 5L fyrr 399,-
**-10% nú 359,-**

SLITSTERK VEGGJAMÁLING
SILKIGLØTT 10L fyrr 499,-
**nú 449,-**

SLITSTERK MATT
VEGGJAMÁLING
10L fyrr 299,-
**-10% nú 269,-**

**Vit selja í løtuni RESTGOYMSLU MÁLING, TAPET OG FLISAR**

**Til dømis: MÁLING úr bert 10,- kr liturin**

**TAPET avsláttur úr 75%**

**stórur avsláttur**

**FLISAR til dømis: 7 kvadratmetur gólv flisar einans 250,- kr í alt**

Sosialurin 341800

**Tel 316066** **máling & gólv**

# Stongt vegna summarfrí

Vegna summarfrí verður kommunuskrivstovan stongd frá mánadegnum 19. juli 2004.

Opið verður aftur mánadagin 16. august 2004.

**Hvalvíkar kommuna**

# Til sølu

10 Tivolibásar til sølu um hóskandi boð fæst. Verður selt saman ella hvør sær.

Kunnu síggjast á G! Festivalinum.

**Bygdafelagið Ternan á Viðareiði**
Tlf. 223558 ella 507765

# Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá 28. juli.

Opið verður aftur 16. august.

**Løgtingsins umboðsmaður**
Postboks 1339
FO-110 Tórshavn